Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn: 3. februar 2023
Málsnummar: 22/12887
Málsviðgeri: UK

Fylgiskjal 2

Viðmerkingar til innkomin ummæli

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta fatan, at kapping er drívmegin fyri vinnuligari menning og framgongd í privatu vinnuni og harvið eisini vøkstri og virðisskapan í føroyska samfelagsbúskapinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at tað hevur týdning at hava góðar og dagfærdar karmar hjá vinnuni at virka innanfyri og her hevur ein dagførd kappingarlóggáva stóran týdning. Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast tí um, at føroyska kappingarlógin verður dagførd. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur sum heild undir við yvirskipaða innihaldinum í lógaruppskotinum. Av tí, at talan er um nógvar smærri tillagingar og dagføringar, mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at nú Uttanríkis- og vinnumálaráðið skipar fyri kunningartiltakið ella tiltøkum, har vinnan fær høvi at seta viðkomandi spurningar til nýggju lógina.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at tað dugir t.d. illa at gjøgnumskoða samanberingarnar við Danmark og Grønland viðvíkjandi ómaksgjøldunum í sambandi við fráboðan um samanlegging av fyritøkum, sum síggja út til at fara at verða fleiri ferðir hægri enn i grannalondum okkara. Í Danmark og Grønlandi er ómaksgjaldið fyri samanlegging eftir vanligum leisti 0,015% av samlaða umsetninginum hjá luttakandi fyritøkunum, men sambært lógaruppskotinum verður ómaksgjaldið í Føroyum 0,1% av samlaða umsetninginum. Í Føroyum verður ómaksgjaldið sostatt næstan sjey ferðir hægri enn í Danmark og Grønlandi. Føroya Arbeiðsgevarafelag eftirlýsir í hesum sambandi greiðari samanberingar og frágreiðingar, tí føroysku ómaksgjøldini eiga ikki at verða hægri enn í okkara grannalondum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við, at skipað verður fyri kunningartiltaki ella fundum, har høvi verður at umrøða ómaksgjøld, samanberingar við Danmark og Grønland, og onnur viðurskifti, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at í nýggju kappingarlógini verða ómaksgjøld áløgd í sambandi við fráboðan av samanleggingum. Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður greitt frá, at talan er um eina líknandi skipan, sum er galdandi í Danmark og Grønlandi. Endamálið við hesum er at vísa á, at talan ikki er um eina serføroyska skipan, men at skipanin eisini er galdandi í øðrum londum.

Hóast skipanin formelt sæð er hin sama í Føroyum, Danmark og Grønlandi, so er tó munur á ómaksgjøldunum og umsetningsmørkunum. Í uppskotinum eru føroysku ómaksgjøldini og umsetningsmørkini lagað til føroyskt viðurskifti.

Endamálið við ómaksgjaldinum í uppskotinum er, at samanleggingareftirlitið í kappingarlógini skal hvíla í sær sjálvum. Ómaksgjaldið er tískil ásett soleiðis, at gjaldið dekkar kostnaðin, sum myndugleikin av royndum metir seg hava í sambandi við viðgerð av einum samanleggingarmáli, t.d. til løn, høli og uttanhýsis ráðgeving.

Ómaksgjaldið er tí ymiskt alt eftir, hvørt talan er um eina samanlegging fráboðað eftir einføldum ella vanligum leisti. Samanleggingar fráboðaðar eftir einføldum leisti taka vanliga millum 3-4 vikur hjá kappingarmyndugleikanum at avgreiða, meðan samanleggingar fráboðaðar eftir vanligum leisti, kunnu taka upp til 90 yrkadagar at málsviðgera. Av hesi orsøk er munur í ómaksgjaldinum.

Støddin á føroyska ómaksgjaldinum - í mun til fráboðanir eftir vanligum leisti - er 0,1% av samlaða umsetninginum hjá luttakandi fyritøkum, tó í mesta lagi 300.000 kr. Í Føroyum eru niðara umsetingsmark fyri, nær skylda er at fráboða samanlegging 75. mió. kr. Hetta merkir, at luttakandi fyritøkur í sambandi við fráboðan eftir vanligum leisti, skulu í minsta lagi rindað 75.000 kr. í ómaksgjaldi.

Í Danmark er ómaksgjaldið fyri fráboðanir eftir vanligum leisti 0,015% av samlaða umsetninginum hjá luttakandi fyritøkum, tó í mesti lagi 1,5 mió. kr. Í Danmark er niðara umsetningsmark fyri nær ein samanlegging er fráboðanarskyldu 900. mió. kr. Hetta merkir, at luttakandi fyritøkur í sambandi við fráboðanir eftir vanligum leisti, í minsta lagi skulu rindað 135.000 kr. í ómaksgjaldi.

Ómaksgjaldið í Danmark er sostatt munandi hægri enn í Føroyum, hóast samanleggingar í Føroyum og Danmark verða viðgjørdar eftir sama leisti.

Kappingareftirlitið metir ikki, at ómaksgjøldini fara at virka avmarkandi fyri talið av fráboðanum, tí ómaksgjøldini bert eru ein brøkpartur av samlaða virðinum á samanleggingini.

Føroya Kærustovnur
Føroya Kærustovnur vísir á, at í § 32, stk. 5, verður málberingin, *nevndin*, nýtt. Kærustovnurin mælir til at nýta málberingina, *kærustovnin*. Uttanríkis- og vinnumálaráðið broytir málberingina til *Føroya Kærustovn*.

Føroya Kærustovnur vísir á, at sambært uppskotinum er freistin taka avgerð í mali, sum er lagt fyri Føroya Kærustovn, 8 vikur. Í hesum sambandi nevnir Føroya Kærustovnur, at tá ið kappingarmál verða løgd fyri stovnin verða onnur mál sett til síðis, partarnir fáa stuttar freistir, og fyrireikingin av málinum byrjar, áðrenn málið er upplýst til fulnar. Føroya Kærustovnur vísir á, at umframt at órógva arbeiði á stovninum, er vandi er fyri, at feilir verða gjørdir, og kæruviðgerðin ikki verður nøktandi, tá ið slík ferð skal vera á málsviðgerðini. Føroya Kærustovnur vísir á, at talan ofta er um mál, sum Kappingareftirlitið hevur arbeitt við í langa tíð, og tí gevur tað lítla meining at skunda mál í gjøgnum eina skurðviðgerð. Føroya Kærustovnur mælir til at strikað freistina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur viðgjørt tilmæli frá Føroya Kærustovni. Kappingarmál kunnu vera trupul og umfatandi, kortini eru málini, sum verða latin Føroya Kærustovni, viðgjørd av Kappingareftirlitinum frammanundan og hava vanliga verið til ummælis í fleiri umførum. Eisini hava

málini verið fyri Kappingarráðið, har møguleiki er fyri munnligari framseting. Málini hava sostatt verið ígjøgnum eina drúgva viðgerð og eru skorin til, áðrenn tey verða latin Føroya Kærustovni. Í sambandi við viðgerð av kappingarmáli hevur Kærustovnurin umframt møguleika at kalla inn serkøn innan kappingarrætt at meta um málið.

Við atliti at partinum, sum hevur verið fyri órætti, og fyri at fremja virkna kapping metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið tað vera óheppið at strikað freistina. Við atliti at viðgerðini í Kærustovninum er í í uppskoti at leingja freistina úr seks vikum upp í átta vikur. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at freistin á átta vikur er hóskandi.

Kommunufelagið
Kommunufelagið vísir á, at í Føroyum er kommunala virksemið í mestan mun grundað á kommunufulltrúnna. Kommunurnar røkja nógvar samfelagsuppgávur og vælferðartænastur, men sera fáar av teimum eru lógarbundnar. Uppgávurnar hjá føroysku kommununum verða tí í stóran mun loystar við heimild í kommunufulltrúnni ella í lóggávu, sum gevur heimild til, at kommunurnar kunnu havast við ávíst virksemi.

Kommunufelagið nevnir í hesum sambandi dømi um uppgávur innan eldraøkið, dagstovnaøkið og frítíðarlív. Tænastur, sum kommunur veita á hesum økjum eru ikki lógarkravdar, men kommunur kunnu lógliga velja at veita tænastur innan hesi øki, og kommunur kunnu enda í tí støðu, at virksemi hjá kommununi er kappingaravlagandi. Hetta er galdandi bæði í mun til tænastur og annað virksemi so sum tiltøk, keyp av útgerð, høli, undir hesum lága ella onga húsaleigu, frítíðarkort o.s.fr. Kommunufelagið vísir á, at nógv av vanligum frítíðarvirksemi kann hugsast at kunna vera rikið á vinnuligum grundarlagi. Tí kunnu stórir partar av tí heilt vanliga og siðbundna stuðlinum, sum kommunurnar veita hesum virksemi, gerast serliga hart rakt av at vera fevnd av kappingarlógini.

Viðvíkjandi § 2 stk. 2
Kommunufelagið vísir á, at hugtakið, almenn regulering, í § 2, stk. 2, ikki er greitt fyri Kommunufelagnum. Í viðmerking til ásetingina stendur, at kommunufulltrúin er at skilja sum almenn regulering, men at hon ikki er ásett við lóg og av hesi orsøk ikki fær somu undantøk. Kapitlar 2 og 3 eru tí galdandi fyri virksemi, sum hevur heimild í kommunufulltrúnni. Kommunufelagið skilir viðmerkingarnar soleiðis, at kommunurnar í nógvum av siðbundnu uppgávunum koma í eina støðu, har verandi virksemi frameftir má metast sum kappingaravlagandi. Úrslitið kann tí verða, at virksemið má halda uppat, ella tænastan til borgaran má dýrka munandi. Kommunufelagið mælir til at broyta viðmerkingarnar soleiðis, at tað sum minstamark er greitt, at virksemi skipað við heimild í kommunufulltrúnni ikki er fevnt av kapitlunum 2 og 3 í lógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at tað er týdningarmikið at hava í huga, at kappingarlógin fevnir um vinnuvirksemi og almennan stuðul til vinnuvirksemi, sambært § 2, stk. 1, í kappingarlógini. Hetta merkir, at myndugleikaútinnan og egin framleiðsla eru undantikin nýtsluøki lógarinnar.

Í tann mun eitt kommunustýri tekur avgerð um, at kommunan skal útinna vinnuvirksemi sambært kommunufulltrúnni, er talan ikki um eina uppgávu, sum er áløgd kommununi sambært lóg. Hetta er ein uppgáva, sum kommunan av egnum ávum hevur átikið sær. Tí eru kapittul 2 og 3 í kappingarlógini galdandi fyri tær kappingaravmarkingar, sum kunnu taka seg upp í hesum sambandi. Í hesum

sambandi er umráðandi at minnast til, at ein slík kappingaravmarking hevur avleiðingar fyri onkran, t.d. eina fyritøku, endabrúkara ella skattgjaldara í kommununi.

Í sambandi við kappingarliga regulering av kommunalum vinnuvirksemi er týðandi at hava í huga, at vinnuvirksemi, sum landsstovnar útinna, somuleiðis er fevnt av kapitlum 2 og 3 í kappingarlógini. Kappingareftirlitið hevur t.d. viðgjørt mál mótvegis Landssjúkrahúsinum og Strandfaraskipum landsins. Tað, at vinnuvirksemi útint við heimild í kommunufulltrúnni verður regulerað av kap. 2 og 3 í kappingarlógini, avmarkar tískil ikki frælsið hjá kommununum, meiri enn tað avmarkar frælsið hjá landsmyndugleikum.

Tey krøv, sum verða sett til kommunur, sum útinna vinnuvirksemi, eru vanliga tey somu, sum verða sett til vinnuvirksemið hjá landsstovnum. Um t.d. alment ella kommunalt vinnuvirksemi er í kapping við privat vinnuvirksemi, kann ikki seljast undir kostprís, og hevur alment ella kommunalt vinnuvirksemi monopol, kunnu okursprísir ikki ásetast.

Í sínum ummælissvari nevnir Kommunufelagið nøkur dømi. Eitt dømi er eldraøkið, har felagið sigur, at hóast eldraøkið er skipað við lóg, so eru tað kommunur, sum veita nakrar ikki lógarkravdar ískoytistænastur.

Í hesum sambandi er vert at hava í huga, at hóast privat bjóða út sama vinnuvirksemi, so hevur kommunan rætt til at hava egna framleiðslu, og hetta er ikki at meta sum vinnuvirksemi, sum er fevnt av kappingarlógini. Ein kommuna kann reka eina kantinu á einum skúla ella elliseimi. Velur kommunan afturat hesum at selja til almenningin, so er hetta virksemi vinnuvirksemi og fevnt av kappingarlógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at hetta er ein góð venja, tí kommunan hevur møguleika at veita eina ískoytistænastu og kann selja ein møguligan yvirskotskapasitet. Men vinnuliga virksemi skal tó sjálvsagt kappast undir somu treytum sum privat vinnuvirksemi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir tí, at tann broyting, sum Kommunufelagið skjýtur upp, kann fáa óhepnar avleiðingar, og at tær avmarkingar, sum § 2 stk. 2 í kappingarlógini hevur við sær, ikki eru órímiligar. Ásetingin tryggjar, at kommunur kunnu virka á einum marknaði, men at hesar skulu kappast á jøvnum føti við privat vinnuvirksemi.

Verður áheitanin frá kommunufelagnum gingin á møti, eru kommunurnar koblaðar út í mun til ásetingar í kappingarlógini. Hvørki føroyskt vinnulív ella landsstovnar, sum útinna vinnuvirksemi, hava slíkt frælsi. Velur t.d. ein kommuna at fara í kapping við ein vinnurekandi, so kann tann vinnurekandi ikki klaga til Kappingareftirlitið um møguliga kappingaravlagandi atferð frá kommununi. Uttanríkis- og vinnumálaráðið gongur tí ikki áheitanini hjá kommunufelagnum á møti.

Skulu kommunur ella landsstovnar útinna vinnuvirksemi, sum er kappingaravlagandi, er rætt, at krav verður sett um, at útinnan hevur heimild í lóg. Vísast skal á, at ein avgerð tikin við støði í kommunufulltrúnni fer ikki ígjøgnum somu eftirkanning sum ein løgtingslóg.

Hinvegin má viðurkennast, at tær viðmerkingar, sum koma frá Kommunufelagnum merkja, at omanfyristandandi ikki kemur nóg greitt fram í lógarviðmerkingunum til nýggju kappingarlógina. Viðmerkingarnar til § 2, stk. 2, verða tí broyttar soleiðis, at setningurin, *talan er ikki um eina skyldu áløgd við lóg*, verður broyttur til orðingina, *talan er tó ikki um eina skyldu áløgd við lóg, tá ið ein kommuna hevur vinnuvirksemi við heimild í kommunufulltrúnni, og eru kapittul 2 og 3 í kappingarlógini tí galdandi.*

Viðvíkjandi § 2, stk. 5
Kommunufelagið vísir á, at § 2, stk. 5, gevur Kappingarráðnum heimild at lata landsstýrismanninum frágreiðing um skaðilig árin, ið ávís almenn regulering hevur á kappingina, umframt koma við uppskotum um, hvussu kappingin kann fremjast. Kommunufelagið skilir ásetingina soleiðis, at kommunurnar ikki kunnu fáa hetta ískoyti frá kappingarmyndugleikanum um, hvussu viðurskiftini hjá kommununi møguliga kundu verið skipað enn betri. Kommunufelagið mælir til at víðkað ásetingina til eisini at fevna um avvarðandi kommunustýri.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at avvarðandi landsstýrismaður, sum varðar av økinum, er rætti myndugleiki at seta seg í sambandi við hesum viðvíkjandi. Ásetingin forðar tó ikki avvarðandi landsstýrismanni at biðja kommunur um viðmerkingar til frágreiðing frá kappingarmydugleikanum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið gongur tí ikki Kommunufelagnum á møti hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi § 12
Kommunufelagið vísir á, at tað skilir orðingina, *almenn regulering*, í § 12 soleiðis, at hon eisini fevnir um kommunufulltrúnna. Kommunufelagið eftirlýsir greiðari viðmerkingar til ásetingina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við Kommunufelagnum; hugtakið, *almenn regulering*, verður ikki lýst nóg greitt í § 12. Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at hugtakið, *almenn regulering*, skal tulkast í samsvari við § 2, stk. 2. í kappingarlógini.

§ 12 snýr seg um almennan stuðul til vinnuvirksemi og ikki útinnan av vinnuvirksemi hjá kommunum. Kommunufulltrúin verður tí í størri mun avgerandi fyri, um ein stuðulsskipan hjá eini kommunu er lóglig sambært almennari regulering ella ikki.

Viðvíkjandi § 12, stk. 3
Kommunufelagið vísir á, at í málum um stuðul verða málini løgd til kommunala eftirlitsmyndugleikan at gera av, hvat hugtakið, *almenn regulering*, fevnir um, meðan hetta í øðrum málum liggur hjá *avvarðandi landsstýrisfólki*. Kommunufelagið vísir á, at hetta verður gjørt, hóast hægsti samsvarandi myndugleiki til avvarðandi landsstýrisfólk ikki er kommunala eftirlitið, men kommunustýrið. Kommunufelagið ger vart við, at kommunala eftirlitið í aðrari lóggávu hevur víðfevndar heimildir at hava eftirlit við, at avgerðirnar hjá kommunustýrinum eru lógligar, og tí er onki praktiskt atlit, ið talar fyri, at nakar annar enn kommunustýrið skal taka avgerð hesum viðvíkjandi. Kommunufelagið mælir til, at tað verður gjørt greitt í viðmerkingunum, at stuðul, sum er veittur við heimild í kommunufulltrúini ikki verður raktur av ásetingum um kappingaravlagandi

stuðul. Kommunufelagið mælir harumframt til, at ásetingin í § 12, stk. 3, 1. pkt. verður broytt soleiðis, at avgerðin verður tikin av “avvarðandi kommunustýri”.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at um kommunustýrið verður avvarðandi myndugleiki, verður tað tann, sum møguliga hevur nýtt eina kappingaravlagandi stuðulsskipan, sum skal meta um, hvørt stuðulsskipanin er lóglig ella ikki. Tulkingin av kommunufulltrúnni er avgerandi í málum, hvørt ein kommunal stuðulsskipan er ólóglig ella ikki, og Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir tí, at avvarðandi landsstýrismaður ella kommunali eftirlitsmyndugleikin er rætti myndugleiki at taka slíkar avgerðir. Uttanríkis- og vinnumálaráðið gongur tí ikki Kommunufelagnum á møti í hesum máli.